# Bulgarin skoraði fyri B68

Bulgarski álopsspælarin, sum roynir seg í B68 í hesum døgum, var við í einum steypadysti, sum varð spældur á Skála sunnudagin.

Dysturin var ímillum Skála og B68 og var í sambandi við Skálastevnuna. Dysturin endaði 2-2, og annað av málunum hjá B68 skoraði Stanislav Stankov. Sambært heimasíðuni hjá B68 stóð bulgarski álopsspælarin seg væl í dystinum.

Dysturin endaði við brotssparkskapping, og hana vann B68, so at teir fóru um fjørðin aftur við steypi í viðførinum.

**-ek**

# Jan Guttesen til ÍF



Árini 1997-2001 var Jan Guttesen av týdningarmestu monnunum á miðvøllinum á B36-liðnum, sum millum annað vann tvey gullmerki í landskappingini, umframt at talan eisini gjørdist um fleiri heiðursmerki av øðrum slag.

Seinnu árini hevur miðvallarin tó verið í lestrarørindum í Danmark, og nú tykist greitt, at summarsteðgurin í ár skal nýtast til fótbólt í Fuglafirði.

Enn eru ikki allir smálutir komnir upp á pláss, men Jan sigur sjálvur, at hann roknar við at spæla í ÍF.

– Tað verður allarhelst soleiðis, at eg skal arbeiða í Fuglafirði í summar, og so havi eg sjálvandi einki ímóti at spæla fótbólt samstundis. Ikki minst tá uppgávurnar kunnu gerast so spennandi, sigur hann.

Og við hesum sipar hann helst til úrtøkuna í steypakappingini higartil, har ÍF við einum sigri í seinnu hálvfinaluni móti NSÍ kann tryggja sær sæti í finaludystinum.

Ætlandi verður tað annars soleiðis, at Jan fær verið við á ÍF-liðnum tey bæði seinastu umførini undan og tey bæði fyrstu umførini eftir summarsteðgin. Og hartil kemur so sjálvandi hálvfinala og møguliga finala í steypakappingini.

**-jm**

# Danmark kann vinna EM

Svenski venjarin hjá FC Keypmannahavn, Havn Backe, heldur, at Danmark kann vinna EM. Hann sigur við Jyllands-Postin, at hava danir ein góðan dag, so hevur liðið styrki til at vinna europameistaraheitið.

Venjarin hjá Toda Jónsson heldur tó, at liðið stendur og fellur við góðum avrikum hjá einstøkum spælarum, og hann heldur, at Jesper Grønkjær og Martin Jørgensen skulu spæla væl, um liðið skal standa seg væl. Eru teir ikki á toppinum, so verða úrslitini meira misjøvn, heldur Hans Backe.

**-ek**

# Fótbóltsskúlin fyri framman

Aftur í ár skipar Fótbóltssamand Føroya fyri fótbóltsskúlum kring landið. Hesaferð verður skúlarnir tríggir í tali, og verða teir hildnir í Sandavági, í Vági og á Toftum.

Skúlin í Sandavági er tann fyrsti av hesum, og verður hann hildin í døgunum 24.-25. juni. Høvuðsvenjarar her eru Atli Gregersen og Páll F. Joensen.

Í Vági verður lagt til brots 1. juli, og verður tað Álvur Hansen, sum kemur at standa við ábyrgdini av skúlanum teir báðar dagarnar.

Seinasti skúli verður á Toftum, og verður hetta vikuskiftið 9. og 10. juli. Her verður tað Abraham Løkin, sum fer at halda skil á.

Tilmeldingarbløð til fótbóltsskúlarnar verða løgd út til feløgini og á posthús og fólkaskúlar kring landið, og er seinasta freist at tekna seg mánadagin, 14. juni.

**-jm**


## Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 m² og er møguleiki fyri at víðka til 200 m². Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 m²/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**

BILUR TIL SØLU



**Prísur kr. 125.000,-**
Anlegg við forsterkara og bassi fylgir við
Til sølu vegna flyting
TEL 22 15 14

veitst tú ikki tað?

1. uppstillingarfundur til kommunuvalið 2004 verður hóskvøldið 27. mai kl. 19.30.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9.

Øll javnaðaráhugaði eru vælkomin.

**Nevndin**

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
www.javnadarflokkurin.fo


## Fráboðan um loyvi til aftursøkking

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 25. mai 2004, við heimild í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, hevur givið **Klaksvíkar kommunu** loyvi til aftursøkking av tilfari

**í Kalsoyarfirði, á knattstøðu 62°15,0' N og 06°39,1' W, út fyri Syðradali**

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Loyvi liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Loyvi kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**


www.sosialurin.fo








# Rørir tað teg?

**Evangelisk møtirøð við Robert Bwalya**

**29.mai - 04.juni**

Leygardag 29.05..................kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnudag 30.05...........kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05.......kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05.......kl.22.00
***Lovsangskvøld***

2.Hvítusunnudag 31.05.......kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

2.Hvítusunnukvøld 31.05....kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Týsdag 01.06..................kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Mikudag 02.06..............kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hósdag 03.06..................kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Friggjadag 04.06.............kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

**Øll møtini verða hildin í Filadelfia, Landavegur 22.**

**Les meir á www.filadelfia.fo**

**Barnamøtir á Hvítusunnu í Ytra skúla.**
Hvítusunnudag ..............kl.11.00 & kl.19.00
2. Hvítusunnudag ..............................kl.11.00

Filadelfia - Landavegur 22 - Tel 314828 - www.filadelfia.fo

Epileptikarafelg Føroya skipar fyri fyrilestrum á:



## Hotel Hafnia hósdagin 03.06.2004 kl. 15.00 - 19.00

**Heitið á fyrilestrunum verða:**

**Bjarki á Rógvi Hansen, neurologur á Ríkissjúkrahúsinum tosar um:**
· Epilepsi og kynslív hjá fólki við epilepsi og hvørji árin heilivágurin hevur á tey.
· "Ketogen diæt", sum er ein kostviðgerð fyri fólk við epilepsi.
· Teir nýggjastu møguleikarnir við kirurgiskari viðgerð.

**Ellids Kristensen, yvirlækni og sexologur á Ríkissjúkrahúsinum tosar um:**
· Varandi brek og kynslív.

**Kl. 20.00 eru ung við epilepsi og ung við diabetis vælkomin á Hotel Hafnia til eina hugnaløtu, har Bjarki og Ellids verða við. (Henda hugnaløta er ókeypis).**

Møguleiki verður at seta spurningar.

Fyrilestrarnir eru ætlaðir øllum við epilepsi og teimum við varandi breki annars, fólki í sjúkrahúsverkinum, heimarøktini, eins og stuðlum undir stuðulfólkaskipanini o.l., lærarum, pedagogum og annars øllum, ið hava áhuga í hesum fyrilestrum.

Tilmelding fer fram á tlf.: 26 30 78 (Randfríð Sørensen) og 21 97 93 (Mari Johannesen), innan mánadagin 31. mai 2004 kl. 12.00.

Kostnaðurin er kr. 150,00 fyri hvønn luttakara og kann flytast á Postgiro nr. 70.548 ella Føroya Sparikassa nr. 174.413.7. Í prísinum er ein máltíð á Hotel Hafnia eftir fyrilestrarnar.

Epileptikarafelag Føroya

Sosialurin 341800

# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

# Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.